Te MD
7-2-95/JT

### Møguligar

# rationaliseringar

### innan undirvísingarverkið saman við tilmæli og hagtølum

*Innihald:*

**Rationaliseringar:**
- Fiskivinnuskúlin í Vestmanna
- Miðnámsskúlin í Suðuroy
- HF-skeið í Klaksvík
- Tekniski skúli í Tórshavn

**Tilmæli:**
- Skipanin við atliti at yrkisútbúgvingum, yrkisskúlunum og yrkisútbúgvingarráði

**Hagtøl:**
- Gongdin í næminga/lærlingatalinum á miðnámsútbúgvingunum í Føroyum í tíðarskeiðinum 1979/80 - 1994/95.

**Landsskúlafyrisitingin**
november 1994

31 JAN. 1995
F. L. j. nr. 2120-19/95 1

## Niðurstøður

**Samandráttur um rationaliseringarnar**

Rationaliseringarnar, sum Landsskúlafyrisitingin er biðin um at gera útrokningar til, hevur hesar sparingar við sær árini 1995, 1996 og 1997: (1000. kr)

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Fiskivinnuskúlin | 288 | 707 | 707 |
| Miðnámsskúlin í Suðuroy | 110 | -310 | -1.040 |
| HF í Klaksvík | 791 | 1.152 | 1.152 |
| Tekniski skúlin í Tórshavn + tól (tilmæli 1) | 2.618 | 3.618 | 3.179 |
| Tekniski skúli í Tórshavn + tól (tilmæli 2) | 3.532 | 5.193 | 4.729 |
| Íalt (v. tilmæli 1) | 3.807 | 5.167 | 3.998 |
| Íalt (v. tilmæli 2) | 4.721 | 6.742 | 5.548 |

**Niðurstøða um hagtøl**

Hagtølini yvir gongdina á miðnámsútbúgvingunum vísa:

- Einans 1% av næmingunum, sum koma úr fólkaskúlanum í 1994/95, sleppa í handverkaralæru.
- Ein sera stór og álvarsom lækking hevur verið í lærlingatalinum síðani 1988/89.
- Tær nýggju tøkniligu útbúgvingarnar viga nakað upp ímóti.
- Talið av studentaskúla- og handilsútbúgvingunum er í vøkstri, soleiðis at yvir 70% av einum árgangi fáa ein students-, HF-, FHS ella HH-útbúgving.

## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

**Rationaliserings ætlan**

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna verður fluttur til Klaksvíkar 1. august 1995.

**Fyrimunir**

Fyrimunirnir við hesari rationaliseringsætlan eru hesar:

- Betri skúlaumhvørvi
- Óvissan um plaseringina av skúlanum fellur burtur, tá ið útbúgvingin er komin at liggja eitt betur hóskandi stað enn í Vestmanna
- Lógarverkið fyri hesa útbúgvingina verður meiri greitt, tá tað verður tað sama sum fyri tær nýggju tøkniligu yrkisútbúgvingarnar.
- Fleiri valmøguleikar, av tí at møguleiki er fyri samlestri í ávísum lærugreinum
- Betri nýtsla av lærarakreftum
- Minni ferðaútreiðslur
- Rakstrar útreiðslurnar lækka, tá skúlin liggur saman við øðrum útbúgvingum á sama skúla
- Serhølir til evnis-, alis- og lívfrøði verða betur gagnnýtt.

**Vansar**

Vansarnir, sum standast av flytingini, eru:

- Skúlin fer at liggja burturfrá, har nógvir av stovnunum og virkjunum, sum skúlin hevur samstarv við, liggja. Hetta er Fiskavirking, alibrúk, Fiskasølan, Fiskirannsóknarstova og Heilsufrøðiliga starvsstovan.
- Skúlin hevur bygt upp eina servitan við lærarakreftum, samstarvsfólkum v.m., ið neyvan øll fylgir við til Klaksvíkar.
- Nógvir av lærarunum á skúlanum hava fast starv í Tórshavn og fara ikki at undirvísa, um skúlin verður í Klaksvík.

**Fortreytir fyri fíggjarligu útrokningunum**

Flytingin kemur bæði at ávirka játtanina til Vestmanna og hana til Tekniska skúlan í Klaksvík. Fortreytirnar aftan fyri fíggjarligu útrokningunum eru hesar:

- Stjórin verður uppsagdur frá 1. august 1995. Hann kann møguliga halda áfram sum leiðari á hesi deildini á Tekniska skúlanum í Klaksvík, og sum vanligur undirvísari.
- Øll starvsfólk verða uppsøgd
- Húsini verða seld ella brúkt til onnur endamál, so at undirvísingarverkið ikki hevur útreiðslur av teimum frá 1. august 1995 at rokna.

- Leigusáttmálar í Vestmanna verða uppsagdir
- Innbúgv, útgerð o.a. verður flutt til Klaksvíkar. Flutningsútreiðslurnar eru settar til 40 tús. kr..

- Roknað verður við, at fiskivinnuútbúgvingin kann leggjast inn undir somu lóggávu sum SIT og HT í Klaksvík. Lønartímatalið er mett at vera tað sama sum fyri hesar útbúgvingar
- Lærararnir verða løntir eftir sáttmálanum hjá lærarum á Tekniska skúlanum
- Læraralønarútreiðslur í Klaksvík verða hesar (1.000 kr.)

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| 1. árið | 177 | 365 | 365 |
| 2. árið | 225 | 475 | 475 |
| 3. árið | 225 | 475 | 475 |
| Felags | 23 | 46 | 46 |
| Íalt | 650 | 1.361 | 1.361 |

- Meirútreiðslur til høli v.m., av tí at skúlin flytur inn í HF bygningin. Roknað verður við, at útreiðslurnar til olju, el, vask vm. verður tað sama sum til HF nú:

| 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|
| 165 | 255 | 255 |

- Serútreiðslur til hesa útbúgvingina á Tekniska skúla í Klaksvík er mett til fylgjandi:

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Ferðaútreiðslur | 50 | 100 | 100 |
| Arbeiðstilfar | 20 | 40 | 40 |
| Annað | 50 | 100 | 100 |
| Íalt | 120 | 240 | 240 |

- Ongar størri umvælingar av HF-bygninginum eru við í útrokningunum.
- Játtanin verður henda:

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Játtan í Vestmanna | 1.520 | 0 | 0 |
| Meirjáttan í Klaksvík | 785 | 1856 | 1856 |
| Íalt | 2.305 | 1.856 | 1.856 |

- Sparingin í mun til játtanaruppskotið fyri 1995 til Fiskivinnuskúlan.

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Játtan í Vestmanna | 288 | 707 | 707 |

**Uppgávur at loysa**

Í sambandi við hesa rationaliseringsætlanina eru fleiri uppgávur, sum skulu loysast áðrenn ella saman við flytingini:

- Lóggáva um fiskivinnuútbúgvingina, lesiætlanir v.m. skal gerast, so at hetta er klárt í góðari tíð, áðrenn skúlin byrjar í august.
- Hølisviðurskifti í Klaksvík: Hvar skal nýggja útbúgvingin húsast?
- Hølisviðurskifti í Vestmanna: Uppsagnir av leigumálum og støða til, hvat skal gerast við húsini hjá skúlanum
- Uppsagnir av stjóra, lærarum og starvsfólkum
- Lønarviðurskifti hjá lærarunum: Eru nakrir trupulleikar við at løna teimum eftir sáttmálanum hjá lærarum á teknisku skúlunum?
- Setan av lærarum í Klaksvík
- Kanna, hvørji serstøk tiltøk skulu gerast fyri næmingarnir, sum eru inni í skipanini nú.

**Tíðarætlan**

Tíðarætlanin er henda:

| | |
|---|---|
| Januar: | - Siga skúlastjóra og fastar lærarar úr starvi. |
| | - Fara undir lóggávuarbeiði |
| Apríl: | - Siga leigumál upp í Vestmanna |
| Juli: | - Pakka niður í Vestmanna |
| | - Flyta til Klaksvíkar |
| | - Seta upp í Klaksvík |

## Miðnámsskúlin í Suðuroy:

**Rationaliseringsætlan**

Einans studentaútbúgving verður á skúlanum

**Fyrimunir**

Fyrimunirnir við hesari ætlan eru:
- Tað verður lættari at hava neyvt innlit í útbúgvingina, ið er á skúlanum
- Møguligt er at bjóða stakgreinir út eftir nýggju skipanini fyri studentsútbúgvingum, og hetta kann koma í staðin fyri fiskivinnu- og handilsútbúgvinga.
- Lønarsáttmálaviðurskiftini verða meiri greið
- Sparing fyri landið

**Vansar**

Vansarnir av at fremja tiltakið eru:
- Útbúgvingartilboðini til ung í Suðuroy verða skerd
- Royndirnar, sum eru av samlestri millum fleiri ymsar útbúgvingar, verða ikki brúktar.

**Fortreytirnar fyri fíggjarligu útrokningunum**

Í útrokningunum av teimum fíggjarligu ávirkanunum, sum hetta tiltakið fer at hava, er tikið við, at studentsútbúgvingin er í eini uppbyggingarfasu, og tí alsamt tyngjandi fíggjarliga:
- Næmingarnir, ið eru í fiskivinnu- og handilsútbúgvingini sleppa at gera seg lidnar
- Útreiðslurnar til fiskivinnu- og handilsútbúgvingarnar eru hesar (1.000 kr.):

| | Egin tímar | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|---|
| FHS | 10 t/v | 0 | 0 | 0 |
| 1 HH | 10 t/v | 80 | 0 | 0 |
| 2 HH | 25 t/v | 300 | 180 | 0 |
| 1 FISK | 10 t/v | 80 | 0 | 0 |
| 2 FISK | 20 t/v | 250 | 150 | 0 |
| 3 FISK | 20 t/v | 250 | 250 | 150 |
| ÍALT | | 960 | 580 | 150 |

Hækkingarnar í útreiðslunum av studentsútbúgvingini eru hesar:

| | tímar | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|---|
| 2 HF | 105 t/v | 730 | 0 | 0 |
| 1 G | 100 t/v | 1.200 | 1.200 | 1.200 |
| 2 G | 125 t/v | 620 | 1.500 | 1.500 |
| 3 G | 130 t/v | 0 | 650 | 1.560 |
| ÍALT | | 2.550 | 3.350 | 4.260 |

- Felagsútreiðslur eftir, at rationaliseringin er framd, eru tær somu sum nú.

- Sparingin í útreiðslunum til handils- og fiskivinnuútbúgvingina er minni enn meirútreiðslan av nýggju studentsútbúgvingini, so at skúlin fer undir øllum umstøðum at hava tørv á eini hægri játtan enn í 1994.

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Minni útreiðslur tí fiskivinnu- og handilsútbúgvingar ikki verða á skúlanum | -160 | -540 | -720 |
| Meirútreiðslur av studentsútbúgvingini | 50 | 850 | 1.760 |
| Meirútreiðslur íalt | -110 | 310 | 1.040 |

**Uppgávur at loysa**

Tað eru ongar serligar uppgávur, sum skulu loysast í sambandi við hetta rationaliseringstiltakið.

**Tíðarætlan**

Boðað skúlanum frá fyrst í árinum, at eingin upptøka verður til FHS ella fiskivinnu framyvir

## HF í Klaksvík

**Rationaliseringsætlan**

HF í Klaksvík verður niðurlagt, og næmingarnir verða fluttir á Kambsdal at ganga í skúla frá 1. august 1995.

**Fyrimunir**

Fyrimunirnir við hesi ætlan eru:

- Størri flokkar verða á skúlanum á Kambsdali
- Ferðaútreiðslurnar hjá lærarunum verða munandi minni
- Umhvørvið fyri HF-útbúgvinini verður betri á einum stórum skúla.

**Vansar**

Vansarnir av flytingini eru:

- Eingin almenn gymnasiel útbúgving verður í Klaksvík
- Næmingarnir skulu ferðast um Leirvíksfjørð
- Tað eru møguliga onkrir næmingar, sum ikki kunnu fara við til Kambsdalar av ymsum grundum (børn o.t.)

**Fortreytir fyri fíggjarligu útrokningunum**

Útrokningarnar av teimum fíggjarligu ávirkanunum, sum hetta tiltakið fer at hava við sær, byggja á fylgjandi:

- Skúlin verður niðurlagdur frá 1. august 1995 at rokna, og allar útreiðslur í Klaksvík fella burtur frá hesum degi. Tað verður roknað við, at skúlabygningurin verður brúktur av Tekniska skúlanum til fiskivinnuútbúgvingina.

- Játtanin til skúlan í Klaksvík verður henda (1.000 kr.):

| 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|
| 1.320 | 0 | 0 |

- Meirútreiðslurnar í Eysturoynni. Av tí at stórar útreiðslur hava verið av ferðing til Klaksvíkar, verður økingin ikki so stór í útreiðslunum á Kambsdali. Roknað er við, at 13 lønartímar um vikuna, sum eru bókaðir á studentaskúlanum, eru brúktir til ferðing frá Klaksvík.
- Økingin í lønarútreiðslunum av flytningini eru (1.000 kr.):

| 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|
| 155 | 1.014 | 1.014 |

- Aðrar meirútreiðslur eru til søvn, vask, el v.m. og eru tær settar til (1.000 kr.)

| 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|
| 50 | 100 | 100 |

- Tað er ikki tikið við, at ein møgulig rationalisering av tímanýtsluni kann fara fram á studentaskúlanum í Eysturoynni. Hetta fer væntandi at viga upp móti, at onkrar av felagslønartímunum verður hægri.

- Játtanin skal broytast soleiðis:

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Játtan í Klaksvík | 1.320 | 0 | 0 |
| Meirjáttan í Eysturoy | 205 | 1.114 | 1.114 |
| Íalt | 1.475 | 1.114 | 1.114 |

- Sparing í mun til nýtsluna til HF í Klaksvík, sum í 1994 er sett til 2.266:

| | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|
| Sparing | 791 | 1.152 | 1.152 |

**Uppgávur at loysa**

Uppgávur at loysa í sambandi við at HF í Klaksvík verður niðurlagt.

- Flytingin skal samskipast við flytingin av fiskivinnuútbúgvingini
- Kannast skal, um tað eru nakrar løgfrøðiligar forðingar fyri at niðurleggja skúlan, og at siga við 2. árs næmingarnar, at undirvísingin heldur áfram í Kambsdali
- Hvør skal hava útgerðina, sum er á HF-skeiðinum í Klaksvík

**Tíðarætlan**

Januar: Kanna løgfrøðiligar forðingar
februar: Studentaskúlin á Kambsdali fær boð um at taka HF í Klaksvík við, tá ið tímatalvan verður løgd fyri 1995/96.
Juli: Flytingin verður framd.

## Tekniski skúli í Tórshavn

**Rationaliseringsætlan**

Virksemið á skúlanum skal verða so lítið sum møguligt.

Hetta kann gerast við:
1. At niðurleggja undirvísingina í flestu lærlingaútbúgvingum eftir støðisárið, av tí at tilgongdin er so lítil.
2. At fáa skúlaheimið at hvíla meira í sær sjálvum.

Av tí at tilgongdin av lærlingum hevur verið so lítil hesi seinastu árini, kann spurningur setast við, um tað er lærlingagrundarlag fyri at hava undirvísing í verandi yrkisgreinum í Føroyum.

| | 88 | 89 | 90 | 91 | 92 | 93 | 94 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilmekanikari | 25 | 17 | 10 | 14 | 4 | 1 | 1 |
| Blikksmiðjur | 5 | 7 | 2 | 3 | 4 | 0 | 0 |
| Bygningssnikkari | 16 | 16 | 1 | 3 | 5 | 0 | 0 |
| **Elektrikari** | **34** | **19** | **8** | **5** | **5** | **5** | **1** |
| Frisørur | 20 | 5 | 14 | 14 | 10 | 3 | 0 |
| Lastbilmekanikari | 1 | 3 | 0 | 1 | 0 | 0 | 1 |
| **Maskinsmiður** | **50** | **24** | **16** | **24** | **26** | **14** | **4** |
| Maskinsnikkari | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Rørsmiður | 7 | 10 | 4 | 3 | 4 | 0 | 0 |
| Stálskipasmiður | 0 | 1 | 0 | 0 | 2 | 2 | 0 |
| Sveisari | 1 | 1 | 4 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Timburmaður** | **51** | **38** | **16** | **1** | **9** | **1** | **1** |
| Íalt | 211 | 142 | 76 | 69 | 69 | 26 | 8 |
| **Eftir í FR** | **135** | **81** | **40** | **30** | **40** | **20** | **6** |
| At flyta til DK | 76 | 61 | 36 | 39 | 29 | 6 | 2 |

Høvuðsyrkini í tekniska skúlanum eru: elekrikari, maskinsmiður og timburmaður.

Í fyrsta lagi verður mælt til, at hildið verður áfram við skúlagongd í hesum yrkisgreinum, men at skúlagongdin í øllum hinum yrkisgreinunum verður flutt til Danmarkar í nøkur ár.

Í øðrum lagi verður mælt til, at øll skúlagongd í lærlingaútbúgvingini eftir støðisárið verður flutt til

Danmarkar í nøkur ár, inntil lærlingagrundarlag aftur er fyri at hava hesa undirvísing í Føroyum.

Neyðugt er at gera stórar íløgur í útgerð á tekniska skúlanum í Tórshavn. Tað er ivasamt, um útgerðin verður gagnnýtt nóg væl. Sum øllum kunnugt er tann tøknifrøðiliga menningin stór, og spurningurin er, um tólini aftur skulu dagførast um nøkur fá ár, hóast bara nakrir fáir lærlingar hava brúkt tey. Um undirvísing skal fara fram á skúlanum, er tó krav, at tann neyðugi tólútbúnaðurin er tøkur.

SIT og atstøðisútbúgvingin halda áfram, so at skúlin ikki dettur heilt niðurfyri. Kemur gongd aftur á vinnuna, kann aftur farast undir lærlingaútbúgvingina í øllum yrkjum, sum hava verið á skúlanum.

Landsskúlafyrisitingin mælir til, at eitthvørt verður gjørt, so at ein størri partur av einum ungdómsárgangi fær eina handverkaraútbúgving.

Viðløgdu hagtøl yvir gongdina á miðnámsútbúgvingunum í tíðarskeiðinum 1979/80 - 1994/95 vísa, at støðan er sera álvarsom. Av teimum sum fara úr fólkaskúlanunum í dag, kunnu einans 10% fáa eina tøkniliga útbúgving, og verður hetta ein av teimum nýggju tøkniligu útbúgvingunum: SIT, Atstøði ella HT. Einans 1% av einum árgangi sleppur í læru í mun til 20% í tíðini fyri búskaparkreppuna.

Rationaliseringin, sum verður viðgjørt her, viðvíkur einans skúlanum. Tá ið mælt verður til at niðurleggja skúlagongdina hjá lærlingum eitt tíðarskeið, so er tað einans tí, at tilgongdin er so lítil, og ikki tí, vit undirmeta tørvin á hesum útbúgvingum í føroyska samfelagnum. Skúlin má tillaga seg kringumstøðurnar, og tá tilgongdin í yrkjunum einans er 1-5 lærlingar, so er ikki longur grundarlag fyri undirvísingini.

**Fyrimunir**

Fyrimunirnir við at niðurleggja skúlagongrina í nógvum ella øllum lærlingayrkjum í Føroyum og at fáa skúlaheimið at hvíla beturi í sær sjálvum, eru:

- Útreiðslur verða ikki av at skipa undirvísing, har 1-5 lærlingar eru í flokkinum
- Útgerð, ið skjótt verður tøknifrøðiliga gomul, skal ikki keypast til nakrar heilt fáar lærlingar.

- Skúlagongdin verður betri á einum væl útgjørdum donskum tekniskum skúla heldur enn á einum illa útgjørdum føroyskum.
- Av tí at SIT og Atstøði helda fram, er skjótt at seta lærlingaundirvísingina eftir støðisárið í gongd aftur, tá virksemið innan føroyska vinnulívið økist aftur.
- Tá ið stuðulin til skúlaheimið verður lækkaður, so ber hetta við sær, at játtanin til skúlan í størri mun verður brúkt til undirvísing.
- Ein minni upphædd til fyrisitingina á skúlanum ber við sær, at játtanin til skúlan í størri mun verður brúkt til undirvísing.

**Vansar**

Tað eru sjálvsagt nógvir vansar við hesi ætlan:

- Ekspertisa verður mist, av tí at eingin undirvísing verður í yrkisgreinum, sum hava verið á skúlanum.
- Lærarar og starvsfólk mugu sigast úr starvi.
- Lærararnir eru tað størsta aktivið hjá einum tekniskum skúla, og vandi er fyri, at tað ikki verður so lætt at fáa teir aftur, verða teir sagdir úr starvi nú.
- Tað fer at taka longri tíð at byrja aftur, tá ið gongd aftur kemur á føroyskt vinnulív.
- Oljuvinnan stendur møguliga beint fyri durum, og fer hetta at seta krøv til tøkniligu útbúgvingarnar.
- Lærlingar, sum fyrr hava kunnað tikið skúlagongdina í Føroyum, mugu til Danmarkar
- Tænastustøðið á skúlaheiminum lækkar, og lærlingarnir verða møguliga sjálvir noyddir at gera sær mat.

**Fortreytir fyri fíggjarligu útrokningunum**

Fortreytirnar, sum liggja aftan fyri tær fíggjarligu útrokningarnar, eru hesar:

- Undirvísingin í yrkjum, ið verða niðurløgd, verður flutt til Danmarkar frá 1. januar 1995 at rokna.

- Lærarar og onnur starvsfólk verða uppsøgd við vanligari uppsagnarfreist við ársbyrjan.

- Sparingin í *tilfarsútreiðslum*, sum er mett út frá nýtsluni seinnu árini (800 tús. árliga), verður henda á teimum 4 deildunum, sum eru á skúlanum:

Tilmæli 1: Um 3 lærlingaútbúgvingar verða eftir:

| *Deild* | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Frisør | 30 | 30 | 30 |
| Metal | 100 | 100 | 100 |
| Træ | 30 | 30 | 30 |
| El | 0 | 0 | 0 |
| Íalt | 160 | 160 | 160 |

Tilmæli 2: Um allar lærlingaútbúgvingar verða fluttar:

| *Deild* | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Frisør | 30 | 30 | 30 |
| Metal | 150 | 150 | 150 |
| Træ | 60 | 60 | 60 |
| El | 60 | 60 | 60 |
| Íalt | 300 | 300 | 300 |

- Lønartímatalið lækkar, men sparingin í 1995 kemur ikki fyrr enn eftir at uppsagnarfeistin er úti. Tann metta sparingin í *lønarútreiðslum* á teimum 4 deildunum á skúlanum er henda (1.000 kr.):

Tilmæli 1: Um 3 lærlingaútbúgvingar verða eftir:

| *Deild* | Spardir løntímar | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|---|
| Frisør | 3.800 | 235 | 470 | 470 |
| Metal | 3.500 | 220 | 440 | 440 |
| Træ | 1.200 | 75 | 150 | 150 |
| El | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Íalt | 7.900 | 530 | 1.060 | 1.060 |

Tilmæli 2: Um allar lærlingaútbúgvingar verða fluttar:

| *Deild* | Spardir løntímar | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|---|
| Frisør | 3.800 | 235 | 470 | 470 |
| Metal | 11.000 | 685 | 1.370 | 1.370 |
| Træ | 2.800 | 175 | 350 | 350 |
| El | 2.200 | 140 | 280 | 280 |
| Íalt | 19.800 | 1.235 | 2.470 | 2.470 |

- Av tí at so fáir lærlingar eru, verður roknað við, at teir lærlingar, sum skulu taka støðisár í Føroyum, passa inn í T2 flokkin, sum verður á skúlanum.

- Ein av høllunum, sum skúlin leigar frá Tórshavnar býráð, verður brúkt til bil-deildina. Tá henda verður niðurløgd, er ikki brúk fyri hesum høli. Sparingin í leiguútreiðslum er henda, um leigumálið verður uppsagt við ársbyrjan (1.000 kr.):

| | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Leiga | 150 | 200 | 200 |

- Sparing í útgerð er mett út frá frágreiðingini, ið Landsskúlafyrisitingin hevur gjørt saman við donskum konsulentum. Játtanin verður veitt á einum serstøkum rakstrarstaði, og hevur soleiðis ikki beinleiðis ávirkan á játtanina hjá skúlanum. Uppskotið, sum Landsskúlafyrisitingin kom við fyri 1995, var íalt 5 mill.kr., men er hetta síðani lækkað til 3 mill.kr.. Hetta er ikki einans útgerð til tekniska skúla í Havn, hóast hann er tann størsti.
  Øll útgerðin er neyðugt, um undirvísingin skal standa mát við útbúgvingar í Danmark. Tá ið minni verður játtað í 1995, viðførur hetta, at útreiðslurnar verða fluttar til eitt komandi fíggjarár. Samlaða dagføringin á Tekniska skúla fer at kosta 6,7 mill.kr., sum eftir ætlan skuldi fremjast árini 1995, 96 og 97.
  Tørvur verður ikki á eins nógvum tólum, um lærlingaútbúgvingin ikki verður á skúlanum. Nakað av dagføringum skal tó til SIT og atstøðisútbúgvingina.

  Sparingarnar í *tólum* verður henda um tiltøkini verða framd:

Tilmæli 1: Um 3 lærlingaútbúgvingar verða eftir:

| *Deild* | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Frisør | 100 | 35 | 29 |
| Metal | 694 | 438 | 371 |
| Træ | 234 | 650 | 260 |
| El | 0 | 0 | 0 |
| Íalt | 1.028 | 1.123 | 659 |

Tilmæli 2: Um allar lærlingaútbúgvingar verða fluttar:

| *Deild* | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Frisør | 100 | 35 | 29 |
| Metal | 694 | 438 | 371 |
| Træ | 234 | 650 | 260 |
| El | 69 | 0 | 0 |
| Íalt | 1.097 | 1.123 | 659 |

- Matgerðin á skúlaheiminum skal ikki verða ein útreiðsla hjá landskassanum. Í løtuni eru lønarútreiðslurnar til henda partin av virkseminum á Tekniska skúla umleið 900 tús. kr. um árið. Um starvsfólkini verða uppsøgd við ársbyrjan, verður sparingin:

| | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Lønir | 700 | 900 | 900 |
| Matur | 300 | 300 | 300 |
| Inntøkur | -400 | -400 | -400 |
| Íalt | 600 | 800 | 800 |

- Tá ið virksemið á skúlanum lækkar, verður ikki neyðugt við so stórari umsiting sum nú. Í løtuni er umframt skúlastjóran, ein fíggjarleiðari og tvey skrivstovufólk. Til sammetingar kann nevnast, at í Klaksvík hevur skúlastjórin einans tvey fólk í hálvdagsstarvi aftur at sær. Tað skal nevnast, at størri umsiting krevst við lærlingaútbúgvingini, tí tað eru fleiri út- og innskrivingar. Í hesum útrokningum er mett, at tað er nógmikið við einum hálvum skrivstovufólki aftur at fíggjarleiðaranum. Sparingin verður henda:

| | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Skrivstova | 150 | 300 | 300 |

- *Samlaða sparingin*, íroknað ætlanina at fáa matfunktiónina á skúlaheiminum at hvíla í sær sjálvum, verður henda fyri teir báðar møguleikarnar:

Tilmæli 1: Um 3 lærlingaútbúgvingar verða eftir:

| | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Tilfar | 160 | 160 | 160 |
| Leiga | 150 | 200 | 200 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Lærarałønir | 530 | 1.060 | 1.060 |
| Skrivstova | 150 | 300 | 300 |
| Skúlaheim | 600 | 800 | 800 |
| Tól | 1.028 | 1.123 | 659 |
| Íalt | 2.618 | 3.643 | 3.179 |

Tilmæli 2: Um allar lærlingaútbúgvingar verða fluttar:

| | 1995 tús.kr. | 1996 tús.kr. | 1997 tús.kr. |
|---|---|---|---|
| Tilfar | 300 | 300 | 300 |
| Leiga | 150 | 200 | 200 |
| Lærarałønir | 1.235 | 2.470 | 2.470 |
| Skrivstova | 150 | 300 | 300 |
| Skúlaheim | 600 | 800 | 800 |
| Tól | 1.097 | 1.123 | 659 |
| Íalt | 3.532 | 5.193 | 4.729 |

**Uppgávur at loysa**

Tað eru nógvar uppgávur, sum skulu loysast, um henda rationaliseringsætlan skal fremjast:

- Lærarar skulu sigast úr starvi, og skal stýrið gera innstilling til hetta.
- Starvsfólk á skúlaheiminum og í umsitingini skulu sigast úr starvi.
- Avtala skal gerast við tekniskan skúla í Danmark um at taka ímóti lærlingum eftir støðisárið.
- Kannast má, um vit skulu rinda donskum tekniskum skúlum fyri at senda lærlingar hagar, ella um danski staturin rindar.
- Leigumál skal sigast upp. Greiða má fáast á, hvørja avtalu skúlin hevur gjørt við Tórshavnar býráð á hesum øki.
- Greiða má fáast á, hvussu matgerðin á skúlaheiminum kann fara fram, tá ið eingin almennur stuðul longur verður veittur til hetta endamálið.

**Tíðarætlan**

Um niðurstøðan verður, at farast skal undir eina av hesum rationaliseringsætlanum, er tíðarætlanin henda:

Desember:- Avtala verður gjørt við skúla í Danmark um at taka ímóti lærlingum úr Føroyum

Januar: - Lærarar og starvsfólk verða søgd úr starvi.

- Lærlingar verða sendir til Danmarkar til skúlagongdina í teimum yrkisgreinum, sum avgjørt verður at flyta til Danmarkar.
- Loysn verður funnin á, hvussu matgerðin á skúlaheiminum kann fara fram.

<u>Tilmæli:</u>

Skipanin við atliti at yrkisútbúgvingum, yrkisskúlum og yrkisútbúgvingarráði

## Skipanin við atliti at yrkisútbúgvingum, yrkisskúlum og yrkisútbúgvingarráði

**Formæli:** Í føroyska undirvísingarverkinum eru útbúgvingar vanliga skipaðar í hesar bólkar:

1. Grundskúli (fólkaskúlin)
2. Miðnámsútbúgvingar
3. Framhaldsútbúgvingar
4. Hægri útbúgvingar

Miðnámsútbúgvingarnar verða vanliga býttar í 2 bólkar, nevnliga: studenta-/HF-útbúgvingar og yrkisútbúgvingar.
Hetta álit viðger **yrkisútbúgvingarnar** og ta 3-deildu skipanina innan hetta økið, nevnliga: 1) **útbúgvingarskipanina**, 2) **skúlaskipanina** og 3) **ráðskipanina.**

Í stuttum kann verða sagt (samstundis verður mælt til at fylgja hesum leisti):
at allar útbúgvingarnar í hesum útbúgvingarbólki hava felagsheitið: **"yrkisútbúgvingar"**, og hava sama uppbýti, t.v.s., at talan annaðhvørt er um lærlingaútbúgvingar, yrkisgymnasialar útbúgvingar ella atstøðisútbúgvingar. Somuleiðis hava allir skúlar við hesum útbúgvingum felagsheitið: **"yrkisskúlar"** (t.e. handilsskúlar, tøkniligir skúlar og fiskivinnuskúli) og hava sama leist við atliti at leiðslu- og ognarviðurskiftum. Nevndu útbúgvingar og skúlar hava eina **felags ráðskipan** (við heitinum yrkisútbúgvingarráðið), har skúlamyndugleikin, vinnan og brúkarar eru umboðað.

Tilmælini, sum umrødd er í hesum áliti eru m.a. grundað á áheitan landsstýrisins (skriv dagfest 04.11.1994). Viðmerkjast skal, at landsskúlastjórin hevur sett nevndir til at gera uppskot um broyting í fiskivinnuútbúgvingini, og nevnd at gera uppskot um handilsskúlaútbúgvingar.

### 1. Útbúgvingarskipanin

**Myndil, sum sýnir yrkisútbúgvingarskipanina:**




(1SF/94)

Verandi skipan við einari støðisútbúgving (í handils- og tøkniligu útbúgvingunum) verður varðveitt. Tó verður mælt til at samskipa hesar báðar støðisútbúgvingarnar og eina støðisútbúgving innan fiskivinnuútbúgvingina í eina lóg. Hetta merkir, at lógin um SIT verður broytt til at fata um **allar støðisútbúgvingar á yrkisútbúgvingarøkinum.**
LSF hevur orðað uppskot um broyting í støðisútbúgvingini við støði í verandi lóg um SIT og FHS.

**Um støðisútbúgvingina skal viðmerkjast:** Í støðisárinum er endamálið at nøkta førleikakrøvini til eina framhaldandi miðnámsútbúgving. Tær lærugreinir og tey lærugreinastig, ið havd verða í støðisárinum, eru í nógvum førum tey somu. Við støði í tí lítla næmingagrundarlagnum í Føroyum verða fyritreytirnar fyri samstarvi, herundir samlestri og undirvísingarsamstarvi við hesi skipan munandi betraðar. Eisini er dentur lagdur á, at næmingar skulu kunna velja aðra útbúgving eftir støðisárið enn hana, teir upprunaliga høvdu í huga, um teir annars lúka upptøkukrøvini. Eitt støðisár eftir hesum leisti er harumframt betri egnað til føroysk viðurskifti við atliti at upptøkum á yrkisskúlum, har tað í dag er torført at skipa flokkar, um næmingar verða tiknir upp til eina ávísa útbúgving heilt frá byrjan av.

Í øðrum lagi verður mælt til at lógin um lærlingaútbúgvingar verður skipað soleiðis, at næmingar (lærlingar) skulu hava tikið støðisútbúgvingina, fyri at teir kunnu verða tiknir upp til skúlagongd í einari lærlingaútbúgving.
Við hesi skipan er greiðari at skipa frálæruna í hesum parti av útbúgvingunum, við tað at allir næmingarnar fylgjast í skúlagongdini. Eisini verður tíðin, sum meistarin skal hava lærling í læru, stytt við einum ári.

Mælt verður til, at lógin um støðisútbúgvingina verður skipað soleiðis, at næmingum, sum í støðisútbúgvingini hava lokið upptøkukrøvini til stovnsetta framhaldandi yrkisútbúgving, verður tryggjað rættin til at verða tikin upp til slíka.

Við støði í frummyndlinum á fyrstu blaðsíðu, verður í talvuni niðanfyri (talrøð 1) víst, hvussu nógvir næmingar fara upp til várpróvtøkuna '95 í yrkisútbúgvingum eftir støðisútbúgvingina. Verða fyritreytirnar fyri at verða tikin upp til nevndu útbúgvingar, at næmingur hevur tikið støðisútbúgvingina, ber til at áseta upptøkutalið av flokkum og næmingum (talrøð 2 og 3).

Í talrøð 1 eru tølini tikin frá útrokningunum í hjáløgdu skjølum um fíggjarviðurskifti, meðan næmingatølini í talrøð 2 eru tilvildarliga vald. Flokkatalið í talrøð 3 er útroknað eftir floksbýtistalinum 20.

| ***útbúgvingar eftir støðisárið*** | **prógv '95** | **ynskiligt upptøkutal** | |
|---|---|---|---|
| | næmingar | næmingar | flokkar |
| lærlingar - handil (FHS. 2. part + HMX) | 8 | 80 | |
| HH | 108 | 80 | |
| Tilsamans HS | 116 | 160 | 8 |
| lærlingar - tøkni | 69 | 80 | |
| HT | 12 | 24 | |
| Atstøði | 68 | 36 | |
| Fisk | 12 | 24 | |
| Tilsamans TS/Fisk | 161 | 164 | 8,2 |
| TOTALUR | 277 | 324 | 16,2 |

Verður tikið upp eftir talrøð 3, ber betur til at stýra allari útbúgvingargongdini so og so (politiskt og fyrisitingarliga), og skipanin verður meira greið og rationell. Er talan harumframt at veita lestrarstuðul í skúlagongdini hjá lærlingum eftir støðisárið og at veita stuðul til læurupláss, er tað ein fyritreyt, at skipanin er greið at fyrisita. Leggjast skal aftrat, at skipanin lýkur allar fyritreytir við atliti at øðrum skipanum - t.d. teirri donsku (samanber m.a. frágreiðingarnar frá fyrr í ár frá donsku konsulentunum í kenslumálaráðnum).

**Um lærlingaútbúgvingarnar eftir støðisárið skal viðmerkjast:** Mælt verður til, at tær verða skipaðar í eina lóg, sum fatar um fyrisiting, handil, skrivstovu og tøkni (herundir møguliga innan fiskivinnu ella matvøru), og at verandi lóg um tøkniligar yrkisútbúgvingar verður skipað í samsvari við upprunaliga uppskotið um tøkniligar yrkisútbúgvingar, soleiðis sum Landsskúlaráðið samtykti í januar 1993, við teirri broyting, at hon fatar um **allar umrøddu lærlingaútbúgvingar**. Tó verður mælt til, at 5. táttur í nevnda uppskoti viðvíkjandi ráðskipan verður ásett í lóg fyri seg.
LSF hevur orðað uppskot um lóg um lærlingaútbúgving í samsvari við omanfyri nevnda uppskot.

## 2. Skúlaskipanin

Við atliti at skúlaskipanini verður mælt til, at allir yrkisskúlar verða skipaðir eftir sama leisti. Hetta merkir, at um skúlarnir verða skipaðir sum sjálveigandi undirvísingarstovnar, skulu teir m.a. skipast eftir somu reglum við atliti at ognarviðurskiftum og leiðsluformi og í samsvari við lógina um skúlafyrisiting. Hetta merkir sostatt, at Fiskivinnuskúlin eisini verður skipaður sum sjálveigandi undirvísingarstovnur (tó er hetta ikki neyðugt, um hesin skúli verður lagdur saman við TSK, og sostatt verður partur av hesum stovni).

Við einari skúlaskipan, sum verður framd í samsvari við **ásetingar landsstýrisins** og **viðtøkum stovnanna,** og sum í høvuðsheitum hevur **eins** meginreglur, verður greiðari hjá skúlunum og skúlamyndugleikunum at fyrisita umrøddu undirvísingarstovnar. Harumframt eigur skúlaskipanin at áseta karmar fyri samstarvi skúlanna millum, bæði hvat viðvíkur undirvísing og hølisviðurskifum.

## 3. Ráðskipanin

Mælt verður til at hava eina **felags ráðskipan** fyri yrkisútbúgvingar eftir tí leisti, sum strikumyndin niðanfyri vísir. Yrkisútbúgvingarráðið skal í tilmælum sínum til skúlamyndugleikarnar viðgera mál sambært teimum heimildum, tí eru givnar við atliti at umrøddu útbúgvingum og skúlum.



Landsstýrið setur yrkisútbúgvingarráðið og tilnevnir formannin, sum skal vera løgfrøðingur.

Harumframt verður ráðið umboðað soleiðis:
Skúlarnir velja 2 limir hvør, sum skulu umboða ávikavist arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar á arbeiðsmarknaðinum, meðan skúlaleiðsla, lærarar og næmingar á umrøddu skúlum velja 3 limir í felag.

Fyri hvørja útbúgving setur yrkisútbúgvingarráðið 3-manna yrkisnevndir, sum skulu umboða arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar og lærarar.

Landsstýrið setur skrivara at samskipa og at avgreiða mál hjá yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum eftir gjølllari av landsstýrinum ásettum reglum.

LSF hevur orðað uppskot til lóg um ráðskipan eftir omanfyri nevnda leisti.

**LSF í november 1994**

yyyyyyyyyyyyyyyyyyy

## Hagtøl:

Hagtøl yvir næmingar/lærlingar á miðnámsútbúgvingunum, 1979/80 - 1994/95.

# Hagtøl yvir næminga/lærlingar á miðnámsútbúgvingunum, 1979/80 - 1994/95.

Kelda er Ársfrágreiðing fyri skúlaverkið og hagtalstilfar frá læruráðnum

*Innihaldið í myndunum:*

**Mynd 1:** Samlað næminga/lærlingatal á miðnámsútbúgvingunum. Tølini vísa øll floksstigini á teimum ymsu útbúgvingunum.

**Mynd 2:** Tal av fólki, ið fáa prógv/lærubræv á miðnámsútbúgvingunum.

**Mynd 3:** Útskrivað úr fólkaskúlanum, býtt eftir fráfaringarflokki.

Í talvu 4 og 5 eru gjørdar metingar um, hvussu nógvir næmingar úr fólkaskúlanum tey einstøku fráfaringarárini seinni fáa eina miðnámsútbúgving. Fyri at gera hesar kanningarnar er neyðugt at rætta taltilfarið, sum var víst í mynd 2 eitt sindur til. Hetta er gjørt á fylgjandi hátt:
Í mun til fráfaringarárið úr fólkaskúlanum kunnu hesir næmingar seinni lúka hesi prógv:

- Student: 3 ár seinni
- HF: 3 ár seinni. Roknað verður við, at næmingarnir eru eitt ár úti, áðrenn teir fara á hf.
- HH: 3 ár seinni. Serflokkurin, sum var fyri studentar, sum kundu taka HH upp á eitt ár, er ikki tiki við.
- FHS: 1 ár seinni. Talið av FHS-arum er korrigerað, so at einans teir eru taldir við, sum ikki fara víðari til HH.
- Handilslærlingar: 3 ár seinni
- Handverkslærlingar: 4 ár seinni
- SIT: 1 ár seinni. Einans teir er taldir við, sum ikki fara víðari til Atstøði ella HT
- Atstøði: 2 ár seinni
- HT: 3 ár seinni
- Fiskivinna: 3 ár seinni

**Mynd 4:** Útskrivað úr fólkaskúlanum tey einstøku árini, saman við mettum tølum fyri, hvussu nógvir av hesum næmingum seinni fáa eina miðnámsútbúgving.

**Mynd 5:** Útgreining av, hvørja miðnámsútbúgving næmingarnir, sum eru útskrivaðir úr fólkaskúlanum, fáa.

**Mynd 6:** Prosentvís uppseting av, hvørja miðnámsútbúgving næmingar úr fólkaskúlanum seinni fáa. Eisini er tikið við talið á teimum, ið ikki fáa útbúgving.

## Næmingar á miðnámsskúlunum 1979/80

| | | 79/80 | 80/81 | 81/82 | 82/83 | 83/84 | 84/85 | 85/86 | 86/87 | 87/88 | 88/89 | 89/90 | 90/91 | 91/92 | 92/93 | 93/94 | 94/95 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Studentaskúlar | Student | 250 | 293 | 371 | 431 | 499 | 510 | 527 | 505 | 477 | 449 | 473 | 519 | 578 | 584 | 609 | 634 |
| HF-skeið | HF | 183 | 238 | 282 | 299 | 301 | 245 | 234 | 250 | 231 | 254 | 249 | 261 | 248 | 241 | 222 | 190 |
| Føroya Handilsskúli | HH | 40 | 31 | 33 | 37 | 53 | 67 | 72 | 81 | 79 | 79 | 128 | 155 | 156 | 182 | 182 | 205 |
| | FHS | 40 | 31 | 33 | 37 | 58 | 110 | 108 | 108 | 106 | 106 | 179 | 184 | 162 | 162 | 182 | 171 |
| | Handilslærlingar | 174 | 169 | 182 | 199 | 177 | 134 | 70 | 81 | 64 | 64 | 49 | 35 | 20 | 18 | 12 | 5 |
| Tekniskir skúlar | Handverkslærlingar | 527 | 520 | 535 | 561 | 720 | 806 | 860 | 881 | 856 | 851 | 771 | 643 | 500 | 356 | 240 | 172 |
| | SIT | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 108 | 108 | 108 |
| | Atstøði | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0 | 30 | 40 |
| | HT | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0 | 20 | 30 |
| Fiskivinnuskúlin | Fiskivnna | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 20 | 40 | 50 | 46 | 47 | 45 | 39 |
| | | 1.214 | 1.282 | 1.436 | 1.564 | 1.808 | 1.872 | 1.871 | 1.906 | 1.813 | 1.823 | 1.889 | 1.847 | 1.710 | 1.698 | 1.650 | 1.594 |

| | | | | | | | | | | | | | | | | | (mett) | (mett) | (mett) | (mett) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prógv | | 79/80 | 80/81 | 81/82 | 82/83 | 83/84 | 84/85 | 85/86 | 86/87 | 87/88 | 88/89 | 89/90 | 90/91 | 91/92 | 92/93 | 93/94 | 94/95 | 95/96 | 96/97 | 97/98 |
| Studentaskúlar | Student | 58 | 74 | 108 | 87 | 131 | 151 | 156 | 149 | 162 | 148 | 146 | 145 | 175 | 179 | 192 | 173 | 225 | 240 | 280 |
| HF-skeið | HF | 70 | 92 | 128 | 132 | 144 | 110 | 104 | 107 | 95 | 123 | 92 | 97 | 124 | 105 | 113 | 109 | 112 | 84 | 84 |
| Føroya Handilsskúli | HH | 24 | 17 | 15 | 13 | 32 | 45 | 44 | 56 | 52 | 78 | 76 | 103 | 104 | 104 | 81 | 108 | 130 | 130 | 130 |
| | FHS | 0 | 0 | 0 | 0 | 58 | 110 | 108 | 108 | 106 | 150 | 179 | 184 | 162 | 162 | 189 | 189 | 189 | 189 | 189 |
| | Handilslærlingar | 82 | 89 | 84 | 83 | 117 | 85 | 30 | 55 | 18 | 30 | 30 | 25 | 18 | 10 | 10 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| Tekniskir skúlar | Handverkslærlingar | 139 | 153 | 157 | 78 | 132 | 168 | 183 | 237 | 218 | 222 | 204 | 212 | 213 | 142 | 76 | 69 | 69 | 26 | 8 |
| | SIT | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 108 | 108 | 108 | 108 | 108 | 108 |
| | Atstøði | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0 | 30 | 68 | 68 | 68 | 68 |
| | HT | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0 | 0 | 12 | 18 | 24 | 24 |
| Fiskivinnuskúlin | Fiskivnna | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 14 | 14 | 6 | 7 | 12 | 12 | 12 | 12 |
| | Próvtøkur | 373 | 425 | 492 | 393 | 614 | 669 | 625 | 712 | 651 | 751 | 727 | 780 | 810 | 816 | 806 | 856 | 939 | 889 | 911 |

| Útskrivað úr fólkaskúlanum | 79/80 | 80/81 | 81/82 | 82/83 | 83/84 | 84/85 | 85/86 | 86/87 | 87/88 | 88/89 | 89/90 | 90/91 | 91/92 | 92/93 | 93/94 | 94/95 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aftaná 10.flokk (ei real) | 587 | 625 | 573 | 630 | 656 | 611 | 598 | 490 | 531 | 517 | 475 | 563 | 711 | 729 | 703 | 678 |
| Aftaná 9.flokk | 21 | 44 | 229 | 158 | 195 | 341 | 170 | 106 | 160 | 192 | 166 | 181 | 91 | 42 | 29 | 71 |
| Aftaná 8. flokk | 25 | 32 | 38 | 36 | 19 | 23 | 31 | 24 | 19 | 22 | 14 | 9 | 8 | 4 | 16 | 0 |
| Aftaná 7. flokk | 49 | 35 | 10 | 9 | 21 | 30 | 8 | 0 | 7 | 0 | 12 | 19 | 8 | 2 | 27 | 22 |
| | 682 | 736 | 850 | 833 | 891 | 1.005 | 807 | 620 | 717 | 731 | 667 | 772 | 818 | 777 | 775 | 771 |

| Hava seinni tikið miðnámsprógv | 79/80 | 80/81 | 81/82 | 82/83 | 83/84 | 84/85 | 85/86 | 86/87 | 87/88 | 88/89 | 89/90 | 90/91 | 91/92 | 92/93 | 93/94 | 94/95 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Student | 87 | 131 | 151 | 156 | 149 | 162 | 148 | 146 | 145 | 175 | 179 | 192 | 173 | 225 | 240 | 280 |
| HF | 132 | 144 | 110 | 104 | 107 | 95 | 123 | 92 | 97 | 124 | 105 | 113 | 109 | 112 | 84 | 84 |
| HH | 13 | 32 | 45 | 44 | 56 | 32 | 58 | 56 | 83 | 84 | 84 | 61 | 108 | 130 | 130 | 130 |
| FHS | 0 | 0 | 0 | 14 | 54 | 56 | 30 | 30 | 47 | 75 | 80 | 81 | 54 | 59 | 59 | 59 |
| Handilslærlingar | 84 | 83 | 117 | 85 | 30 | 55 | 18 | 30 | 30 | 25 | 18 | 10 | 10 | 8 | 8 | 8 |
| Handverkslærlingar | 132 | 168 | 183 | 237 | 218 | 222 | 204 | 212 | 213 | 142 | 76 | 69 | 69 | 26 | 8 | 10 |
| SIT | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 66 | 22 | 16 | 16 |
| Atstøði | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 30 | 68 | 68 | 68 |
| HT | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 12 | 18 | 24 | 24 |
| Fiskivnna | - | - | - | - | - | - | - | - | 14 | 14 | 6 | 7 | 12 | 12 | 12 | 12 |
| | 448 | 558 | 606 | 640 | 614 | 622 | 581 | 566 | 629 | 639 | 548 | 533 | 643 | 680 | 649 | 691 |

| Hava tikið miðnámsútbúgving | 79/80 | 80/81 | 81/82 | 82/83 | 83/84 | 84/85 | 85/86 | 86/87 | 87/88 | 88/89 | 89/90 | 90/91 | 91/92 | 92/93 | 93/94 | 94/95 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Útskrivað úr fólkaskúlanu | 682 | 736 | 850 | 833 | 891 | 1.005 | 807 | 620 | 717 | 731 | 667 | 772 | 818 | 777 | 775 | 771 |
| Hava seinni lokið miðnám | 448 | 558 | 606 | 640 | 614 | 622 | 581 | 566 | 629 | 639 | 548 | 533 | 643 | 680 | 649 | 691 |
| Útbúgvingarprocent | 66% | 76% | 71% | 77% | 69% | 62% | 72% | 91% | 88% | 87% | 82% | 69% | 79% | 88% | 84% | 90% |
| Hava onga miðnámsútbú | 234 | 178 | 244 | 193 | 277 | 383 | 226 | 54 | 88 | 92 | 119 | 239 | 175 | 97 | 126 | 80 |

**Mynd 1: Tal av fólki í miðnámsútbúgving 1979/80 - 1994/95**



Mynd 2: Próvtøkur á miðnámsútbúgvingunum 1979/80-1993/94



## Mynd 3: Útskrivaði úr fólkaskúlanum 1979/80 - 1993/94



**Mynd 6: Prosentvíst býtið av hvørja miðnámsútbúgving, næmingar úr fólkaskúlanum seinni fara at fáa (meting)**



## Mynd 4: Útskrivaði úr fólkaskúlanum, ið hava tikið miðnámsútbúgving

